NORÐOYA SPARIKASSI

# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2006

## RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2006

| Viðm. | | 2006<br>1.000 DKK | 2005<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 37.775 | 35.973 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 11.260 | 7.926 |
| | Netto rentuinntøkur | 26.515 | 28.047 |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum | 463 | 42 |
| | Kostnaður og provisjónsinntøkur | 3.605 | 1.615 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisjón | 176 | 128 |
| | Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 30.407 | 29.576 |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra o.a. | -4.255 | -577 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 217 | 385 |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 17.267 | 16.539 |
| | Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 725 | 475 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 100 | 5 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 1.079 | 2.155 |
| | Úrslit áðrenn skatt | 7.198 | 10.210 |
| | | | |
| | Skattur | 1.356 | 2.051 |
| | | | |
| | Hálvársúrslit | 5.842 | 8.159 |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI 2006

| Viðm. | | 2006<br>1.000 DKK | 2005<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | Ogn | | |
| | Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankanum | 22.200 | 26.416 |
| | Ogn hjá fíggjarstovnum | 33.786 | 40.452 |
| | Útlán | 1.257.577 | 1.048.271 |
| | Lánsbrøv | 174.915 | 108.224 |
| | Partabrøv | 61.859 | 724 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 0 | 15.556 |
| | Kapitalpartur í tilknýttum fyritøkum | 10.985 | 0 |
| | Ítøkiligar ognir | 13.089 | 9.991 |
| | Onnur ogn | 3.163 | 1.960 |
| | Ogn tilsamans | 1.577.574 | 1.251.594 |
| | | | |
| | Skuld og eginpeningur | | |
| | Skuld til fíggjarstovnar | 0 | 0 |
| | Innlán | 1.271.842 | 970.432 |
| | Onnur skuld | 14.002 | 10.668 |
| | Avsetingar til útreiðslur | 2.741 | 2.727 |
| | Skuld tilsamans | 1.288.585 | 983.827 |
| | | | |
| | Eginpeningur | 283.147 | 259.608 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | 5.842 | 8.159 |
| | Eginpeningur tilsamans | 288.989 | 267.767 |
| | | | |
| | Skuld og eginpeningur tilsamans | 1.577.574 | 1.251.594 |
| | | | |
| 5 | Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna | | |
| | Ábyrgdir og aðrar skyldur | 184.812 | 29.343 |

## VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2006<br>1.000 DKK | 2005<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | | |
| | Renta av innistandandi í peningastovnum | 1.005 | 538 |
| | Renta av útlánum | 34.116 | 32.467 |
| | Renta av lánsbrøvum | 2.654 | 2.968 |
| | Rentuinntøkur tilsamans | 37.775 | 35.973 |
| | | | |
| 2 | Rentuútreiðslur | | |
| | Renta til peningastovnar | 0 | 0 |
| | Renta til innlán | 11.195 | 7.872 |
| | Renta til ábyrgdarapening | 65 | 54 |
| | Rentuútreiðslur tilsamans | 11.260 | 7.926 |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra o.a. | | |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum | -2.224 | -605 |
| | Virðisjavnan av partabrøvum | -2.383 | 0 |
| | Virðisjavnan av gjaldoyra | 352 | 28 |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans | -4.255 | -577 |
| | | | |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | | |
| | Lønir og samsýning til umsjónarráð og stjórn | 877 | 816 |
| | Starvsfólkalønir | 5.928 | 5.321 |
| | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 1.150 | 962 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 639 | 455 |
| | Útreiðslur til starvsfólk tilsamans | 8.594 | 7.554 |
| | | | |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 8.673 | 8.985 |
| | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans | 17.267 | 16.539 |
| | | | |
| 5 | Ábyrgdir og aðrar skyldur | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 161.830 | 23.075 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 22.982 | 6.268 |
| | | 184.812 | 29.343 |

## LYKLATØL 1. HÁLVÁR

| Lyklatøl | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 20,0 | 27,1 | 28,3 | 27,2 | 30,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 20,0 | 27,1 | 28,3 | 27,2 | 30,1 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 2,5 | 3,9 | 4,5 | 5,5 | 5,9 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 2,0 | 3,1 | 3,6 | 4,4 | 4,7 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,38 | 1,53 | 1,63 | 1,79 | 1,77 |
| Rentuváði | 2,5 | 1,5 | 1,3 | 2,7 | 2,5 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 100,7 | 111,3 | 101,9 | 96,2 | 92,0 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 85,72 | 73,9 | 149,3 | 185,0 | 248,0 |
| Stórir kundar tilsamans | 49,2 | 22,8 | 37,9 | 51,2 | 27,5 |
| Burturleggingarprosent | 1,7 | 2,9 | 3,4 | 2,9 | 3,9 |
| Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,1 | 0,2 | 0,2 | 0,0 | 0,3 |
| Hálvársútlánsvøkstur í árinum | 13,2 | 8,0 | 1,1 | 5,8 | 5,6 |
| Útlán í mun til eginpening | 4,4 | 3,9 | 3,6 | 3,6 | 3,5 |

# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2006 HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA

Norðoya Sparikassi hevði eitt úrslit eftir skatt fyrra hálvár 2006 uppá 5,8 mió. kr. móti 8,2 mió kr. fyrra hálvár 2005. Hetta er 2,3 mió. kr. minni enn somu tíð í fjør.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 26,5 mió. kr. og er hetta ein minking uppá 1,5 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2005, tá netto rentuinntøkurnar vóru 28 mió. kr. Minkingin kemst í høvuðsheitum av, at innlánini eru vaksin skjótari enn útlánini, soleiðis at sparikassin tann 30. juni hevði eitt innlánsyvirskot uppá 14,3 mió.kr.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 30,4 mió. kr. móti 29,6 mió. kr. sama tíðarskeið í 2005, ið er ein vøkstur uppá 0,8 mió. kr. Vøksturin stavar í høvuðsheitum frá provisjónsinntøku frá ábyrgdum, ið seinasta árið eru øktar við 139 mió. kr.

## Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra o.a.

Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra o.a. vísti eitt hall uppá 4,3 mió. kr. fyrra hálvár 2006 móti einum halli uppá góðar 0,6 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Sparikassin hevur í ár gjørt íløgur í børsskrásett partabrøv, tískil hevur virðisjavnan av partabrøvum ávirkan á raksturin hjá sparikassanum.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 17,3 mió. kr. móti 16,5 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein vøkstur uppá 0,8 mió. kr. Vøksturin stavar í høvuðsheitum frá øktum sáttmálabundnum lønum.

## Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar

Avskrivingar og burturleggingar móti tapi av útlánum og ábyrgdum vóru 1,1 mió. kr., sama tíðarskeið í 2005 vóru avskrivingar og burturleggingar móti tapi av útlánum og ábyrgdum 2,2 mió. kr.

## Fíggjarstøðan

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 1.578 mió. kr. móti 1.252 mió. kr. fyrra hálvár 2005. Hetta er ein vøkstur uppá 26,0%. Innlánið er nú 1.272 mió. kr. móti 970 mió. kr. fyrra hálvár 2005, sum svarar til ein vøkstur uppá 31,1%. Útlánið er nú 1.258 mió. kr. móti 1.048 mió. kr. fyrra hálvár 2005, svarandi til ein vøkstur uppá 20,0%.

Eginpeningur sparikassans er nú góðar 289 mió. kr., og er farna árið øktur við 21,2 mió. kr., ið er ein vøkstur uppá 7,9%. Eginognin er nú 18,3% av samlaðu fíggjarstøðuni móti 21,4% fyrra hálvár 2005.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið sparikassans er nú 269 mió. kr. móti 175 mió. kr. í 2005. Gjaldførið er 51% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans, meðan lógin krevur 15%, og av samlaðu skyldum sparikassans 19%, her krevur lógin 10%.

Solvensur sparikassans er 20,1%, í mun til 27,1% fyrra hálvár 2005. Lógin krevur 8%.
Orsøkin til fallið í solvensprosentinum er økta virksemið hjá sparikassanum.

## Útlit seinra hálvár

Sparikassin væntar eitt betur úrslit seinra hálvár 2006.